

*Beinta fekk eina spennandi avbjóðing í summar, tá hon seymaði sín størsta brúðarkjóla, har hon brúkti heilar 60 metrar av toyi.*

skal tað hvørki sparast upp á tilfarið ella dygdina, heldur Beinta.

Tí hugsar hon nógv um góðskuna av tilfarinum, sum hon brúkar. Ofta er tað natúrligt tilfar, so sum rein ull og silki. Hetta finnur hon á netinum og bíleggur úr Danmark og Svøríki, og eisini viðhvørt úr Fraklandi.

Hon heldur, at tilfarið er eitt eyðkenni við klæðunum, sum hon seymar.

– Eg brúki ofta litir, tí eg haldi, tað er meira livandi. Ikki so nógv svart og hvítt. Til dømis seymaði eg ein reyðan brúðarkjóla einaferð, tí brúðurin ynskti tað, sigur Beinta, sum ikki tímir at seyma klæðningar til mannfólk.

**Kundaskarin**

Spurd, hvør keypir hennara klæðir, greiðir Beinta frá, at tað eru allir aldursbólkar. Eitt nú konfirmantar og studentar. Eisini eru fleiri brúdleyp, gullbrúdleyp, silvurbrúdleyp og tílík hátíðarhald. So hon seymar mest til bíleggingar og til tann einstaka kundan.

Onkutíð eru tað eisini fólk, ið hava okkurt, tey vilja krógva. Tað kann vera eitt arr ella onkur kropsskaði. Tá seymar hon plaggið til, so tað krógvar skaðarnar.

Hon endar við at siga frá eini stuttligari hending.

– Eg seymaði einaferð eitt dress til ein kunda, sum var í brúdleypi hjá einum tjóðveldispari, har øll vóru í føroyskum klæðum. Onkur viðmerkti hetta og spurdi: Hví ert tú ikki í føroyskum klæðum? Tá svaraði mín kundi: Jamen, eg eri í føroyskum klæðum!

---

*Lagt til rættis:*
*Marin H. Eidesgaard og*
*Sigurbjørg Fríða Nielsen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*


